# Idé Møblar væntar yvirskot hóast minni sølu

**Idé Møblar á Hálsi væntar at koma út úr árinum við einum yvirskoti, hóast keypihugurin í ár hevur verið minni. Vit hava havt fleiri góð ár og hava lagt upp fyri verri tíðum, sigur Birgir Andreasen, stjóri**

HANDILSVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóast millum lítið og einki nýtt verður bygt og eftirspurningurin eftir innbúgvi er minkaður munandi, væntar Føroya Møblasøla – Idé Møblar – at enda árið við svørtum tølum á botnlinjuni.

Orsøkin til tað er ikki, at nógv fólk eru søgd úr starvi, men hinvegin at fyritøkan alla tíðina hevur gjørt »nátúrligar tillagingar«, sum stjórin tekur til.

- Bert ein dama úr gávudeildini er uppsøgd til 1. februar, og tað er einasta. Annars hevur tað verið ein nátúrlig tillaging av virkseminum, sigur Birgir Andreasen, stjóri.

Við nátúrligum tillagingum sipar hann til, at fleiri av næmingunum hjá teimum eru útlærdir og hava valt at ganga aðrar leiðir. Har fólk eru farin, er eingin settur í staðin, og tískil er talan bert um eina uppsøgn, sum er til t ann 1. februar.

- Tað merkist væl, at keypihugurin er minni nú, enn hann var. Møblar og bilar eru kanska tey fyrstu tingini, sum fólk halda aftur við at keypa, tá tíðirnar gerast verri, men vit selja framvegis heilt fitt. Men vit hava havt 10 góð ár her í nýggja bygninginum hjá okkum, og vit hava konsoliderað okkum móti verri tíðum, staðfestir Birgir Andreasen.




*Idé Møblar á Hálsi kemur væntandi úr roknskaparárinum 2009 við einum yvirskoti á botnlinjuni*
*Savnsmynd*






# Roknskaparserfrøðingur til Posta

## Roknskaparserfrøðingur við hegni til tøkni

Sum partur av framhaldandi virkismenningini á Posta, leita vit eftir einum persóni til at mynda framhaldandi menningina av okkara figgjarstýringsskipan. Vit nýta figgjarstýringsskipanina Microsoft Dynamics Nav, og eru í løtuni á versión 4.0.

Roknskaparserfrøðingurin fær tilvísing til figgjarstjóra felagsins.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at menna okkara grundarlag fyri búskaparstýring og rapportering, at útvega analysur og líknandi framhyggjandi tilfar til stjórn felagsins.

Ein partur av menningararbeiðinum verður at smidliggera og effektivisera arbeiðshættirnar í figgjarligu umsiting felagsins.

**Tú**
Tú hevur drúgvar royndir frá Navision umhvørvi og hevur gjøgnum praktiskar royndir bygt upp eina greiða fatan av, hvussu mest fæst burturúr Microsoft Dynamics Nav.

Tú kanst vísa á ítøkilig úrslit frá líknandi starvi. Tað er títt eyðkenni, at tú ert ágrýtin og røkkur teimum málum, tú setur tær. Tú sært møguleikar heldur enn forðingar, og tín arbeiðsháttur er miðvísur og vælskipaður.

Vit rokna við, at tú hevur roknskaparútbúgving sum til dømis HD, Cand Merc ella líknandi.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt sera spennandi og fjøltáttað starv í einum jaligum umhvørvi við kappingarførari løn, góðum setanartreytum og sjálvstøðugum arbeiðsøki.

Útbúgvingarmøguleikar og neyðug skeið er ein sjálvfylgja, eins og tú fært ávirkan á, hvussu starvið verður bygt upp.

**Umsókn**
Umsóknir vit avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til:

Posta
Att: Starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
posta@posta.fo

og vera okkum í hendi skjótast til ber og í seinasta lagi hin **10.12.09**

**Spurningar**
Spurningar um starvið kunnu setast Vivi Egholm, figgjarstjóra, á tel. 21 31 93

Stutt um Posta
Uml. 250 fólk starvast hjá Posta. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn.

Posta